Frelsunarherurin Vágur
Fríggjakvøldið kl. 19.30 orðið á borðið.
Leygarkvøldið kl. 20 møti v/ Inger og Hans Berntsen. Bøn fyri sjúkum. Øll eru vælkomin
Sunnudagin kl. 11 sunnudagsskúli/morgunmøti.
Kl. 18 møti v/Inger og Hans Berntsen. Bøn fyri sjúkum. Øll eru vælkomin
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 ordið á borðið kl. 20 heimaforbundi.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Jacob Hendrik og Rosu Hansen. Hjartaliga vælkomin.

Kollafjarðar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli og møti kl. 18.
Týskvøldið kl. 20 verður bíbiltími v/Dan Eliasen.
Hóskvøldið kl. 19.30 verður bønarløta. Øll eru vælkomin.

Hvalvíkar missiónshúsið
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og møtið við Ólavi Jakobsen Hósvík kl. 18. Øll eru vælkomin.

Kambsdalur, Handilsskúlin
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøldið kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

Karmel, Eiði
Sunnukvøldið kl. 19 møti við Justinus Poulsen.

Missiónshúsið í Leirvík
Sunnudagin kl. 14.30 verður sunnudagsskúli og kl. 18 verður møti við Øssur Kjølbro, evni, dópur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Andrew Bandar.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Rúna Rasmussen. Sangur við Jónvár Frederiksberg.
Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

Lívsins Orð, Saltangará
Sunnumorgun kl. 10.30 Møti v/J.P. Jóhannesen.
Øll hjartaliga vælkomin.

Møti á Hellunum
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti á Hellunum. Talari: Karl Michelsen og Mourits Mouritsen. Kórið "Millum túrar" singur.

Frá Christianskirkjuni
Fríggjakvøldið kl. 20 heldur Ole Rabjerg psykologur ein fyrilestur, við heitinum "tann neyðuga eginumsorganin". Fyrilesturin er ókeypis.
Øll eru vælkomin.

KFUM & K í Klaksvík
Sunnudagin
kl. 14.00 Sunnudagsskúli
kl. 17.30 Bønarløta
kl. 18.00 Møti við ungdóminum
kl. 21.00 Ungdómsmøti

Missiónshúsið á Selatrað
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti. Talari, Árni Jacobsen, Leirvík og sangarar, Johan Edvard og Pól Suni.

Aglow Suðuroy
Fundur verður i Skúlanum í Hvalba 15. maj kl. 19.30.
Inga Berntsen luttekur og biður fyri sjúkum.
Allar kvinnur eru vælkomnar.

Missiónshúsinum í Vági
Sunnukvøldið verður møti kl. 18. Sunnudagsskuli kl. 13.30.

Missiónshúsið í Sumba
Møti verður sunnudagin kl. 18 við Árna og Ásbjørg Kjærbæk. Øll eru vælkomin.

Betania Sumba
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin.
Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Jógvan Højgaard, trúboðara. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið í Tórsgøtu
tlf: 316491/286491
Teldupost: tilhald@torshavn.fo
Opið er mánadag til fríggjadag kl. 09.00 – 17.00
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Bindiklubbur.
Kl. 10 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 14-16 Prát.
Mánadagur
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur, Grete Ellingsgaard.
Kl. 11 Enskt talumál.
Kl. 11 Máling og tekning, Arngerð Joensen.
Kl. 14 Kortspæl og onnur spøl.
OBS!! Nevndarval 12. mars. Veljast skulu 2 nevndarumboð. Uppskot til valevni skulu vera inni í seinasta lagi 8. mars í hugskotkassan í gongini í Tilhaldinum.
Týsdagur
Kl. 10 Vit syngja, Simme Jacobsen. Øll eru vælkomin.
Kl. 14 Ferðafrásøgn og myndir úr Grønlandi við Juvel 11 2009. Marita og Leivur Guttesen. Øll eru vælkomin.
Mikudagur
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Bindiklubburin. Fyrireiking til jólasøluna.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Bindiklubbur.
Kl. 10 -13.30 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491
Kl. 14 Túrur: Vitja framsýningina á Náttúrugripasavninunum, Palli Askham, frásøgufólk. Øll eru hjartaliga vælkomin. Randi og Elisabeth, fysioterapeutar.
Kl. 15 Fimleikur, Dánjal Húsgarð.
Hósdagur
Kl. 9-11.15 Bólkur 1, Tekstviðgerð grundskeið, Páll Poulsen. Bólkur 2, Tekstviðgerð víðkað skeið, Páll Poulsen. Bólkur 3, Leita og samskifta á alnótini, Páll Poulsen.
Kl. 10 Fimleikur, Greta Ellingsgaard.
Kl. 11 Lesibólkurin: Vit lesa: ”Bannað veri tíðaráin” Per Petterson. Hittast 25. feb. Vit halda til á bókasavninum. Øll áhugaði eru vælkomin.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen.
Fríggjadagur
Kl. 9-17 Bindiklubbur.
Kl. 10 Matgerð, Bjørk Hendriksen. Nøkur pláss eru. Tilmelding: 316491.
Kl. 14-16 Prát.

OBS Fimleikurin hjá Dánjali Húsgarð byrjar aftur 17. feb.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Tilhaldið Hugnin í Sandoy
hevur opið mánadag, mikudag og hósdag frá kl. 13 til 17. Allar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Losjan í Havn,
Tinghúsvegur 18
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

Pensionistafelagið í Havn
Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Telefon: 22 27 33
E-mail: finnurj@post.olivant.fo

Dagtilhaldið í Gøtubrá
Opið týs- og hósdag kl. 15-18

Eldrafelagið Nón
Opið hús mánadag til fríggjadag kl. 14.30-17.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Tilhaldið Sóljan
Klaksvíksvegur 35
Klaksvík · tlf. 459091
Teldupostur:
dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag til hósdag
kl. 13.30 – 17.30
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.
Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.
Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

Dagtilhaldið í Fuglafirði
Vit møtast í Lonini mánadag, týsdag og mikudag kl. 15.
Øll eldri eru vælkomin.

Dagtilhaldið í Nólsoy
er opið mána- týs- og hósdag frá kl. 13 til 17.

Dagtilhaldið Blákollan á Oyri
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

Dagtilhaldið í Vági
Hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll vælkomin.

Eldrahugni á Tvøroyri
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

Vága Pensionistafelag
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

Vitjunarvinir
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015 - 110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

Spælistovan í Margarinufabrikkini
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

Giktafelag Føroya
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c - 100 Tórshavn
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

Lymfødemfelagið
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

Malta, Hirtshals
Mikukvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Evangeliska Røddin, Odense
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz

Føroyingafelagið í Stavanger
www.foroyingafelag.com

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48 D, 8000 Århus C
www.aarstova.dk

Cøliakifelag Føroya
Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783.
Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo

Kvinnuhúsið
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10 - 17. Tlf. 31 72 00 svarar alt samdøgrið.
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

Felagið fyri lesi- og skriviveik
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum
MBF Húsið Íslandsvegur 10c, FO-100 Tórshavn
E-Mail: hoyr@post.olivant.fo
Heimasíða: www.hoyr.fo
Formaður: 215497 E-mail: jakdan@post.olivant.fo
Næstformaður: 421092 - 281179 E-mail: pouloeregaard@hotmail.com
Kassameistari: 319588 - 212839 E-mail: marjunhansen@hotmail.com

Føroya Felag Móti Krabbameini
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15. Tlf. 317959.
T-post: ffk@post.olivant.fo
www.ffk.fo

Nýrafelagið, Áarrás 3, Argir
Form.: Hallbjørg Hansen, tlf. 314796 / 514796

Amnesty International Føroya Deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur:

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn:
Bústaður:
Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<

HEILSANIR

Góða Ronja
Eg vil ynskja tær hjartaliga tillukku við 7 ára degnum. Dadda elskar teg.
Alt tað besta.
Kærar heilsanir Dadda (Joan)

Góða fitta omma á Langanesi
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum.
Takk fyri, at tú ert so góð við okkum, og Guds signing framyvir.
Ynskja Benjamin, Beinta, Markus, Tanja, Hanna, Heidi, Rakul og Rósa